Heilsumálaráðið

Dagfesting:	07. september 2023
Mál nr.:	23/10957
Málsviðgjørt:	
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	24.08.2023

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan

§ 1. Landsstýrisfólkinum verður heimilað at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan.
Stk. 2. Útreiðslurnar sambært stk. 1 kunnu í mesta lagi verða 43,7 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Arbeiðið at byggja H-bygningin er nú komið so langt, at hann mestsum sær út til at vera liðugur. Arbeitt verður við at yvirtaka og royndarkoyra ymsar tekniskar skipanir og annað. Arbeiðið at samanbinda H-bygningin og B-bygningin er eisini í gongd. Harumframt er arbeiðið í gongd við at innrætta víðkaða partin av kjallaranum til goymslu, reingerð og parkering. Nakað av hesum arbeiði er drúgt, so tað gongur ein tíð, áðrenn sjúklingar kunnu verða innlagdir og koma til ambulantar viðgerðir í hesum nýggja partinum av Landssjúkrahúsinum. Roknað verður við, at tað er tann víðkaði parturin av kjallaranum, ið tekur longst tíð.

H-bygningurin er komin væl áleiðis, og við gjøgnumgongd er komið fram á nøkur bygningsarbeiði, ið eru komin afturat. Harumframt hevur arbeiðið drigið út, og tað hevur fleiri byggiplássútreiðslur o.a. við sær.

Við hesum grundarlagi verður nýggj verklagslóg gjørd, fyri at fáa materiella heimild at halda áfram á byggiplássinum og til bygningsarbeiðir.

Málslýsing

Meirútreiðslurnar standast av hægri útreiðslum til bygningsarbeiðir, byggiplássrakstur og longda byggitíð, umframt isolatiónsstovur. Tilsamans vanta 43,7 mió. kr. í til verkætlanina við H-bygninginum. Upphæddin er útgreinað í fylgiskjali 1.

H-bygningurin er ein stórur bygningur. Hann er umleið 15.000 fermetrar og rúmini fleiri enn 500. Nógv er at fara um, og við gjøgnumgongd er komið fram á ymisk viðurskifti, ið eru at gera afturat. Talan er um at fáa bygningin at hóska betur til økta virksemið og endamálið.

Bygningsarbeiðir
Landssjúkrahúsið og Landsverk hava í felag gjørt eina yvirskipaða lýsing av tí, sum mett verður skal afturat, til at fáa H-bygningin kláran til sjúkrahúsvirksemið. Bygningsarbeiðini, talan er um, hava ikki verið lýst í nøgdarlistum áður, umframt at tað í fleiri førum er talan um dagføring og betranir av verandi veitingum. Landssjúkrahúsið hevur víst á, at talan er um bygningsarbeiðir, sum skulu til fyri at fáa H-bygningin kláran til sjúkrahúsvirksemið.

Isolatiónsstovur
Í løgtingslóg nr. 34 frá 31. mars 2017 um broyting í løgtingslóg nr. 129 frá 22. desember 2008 um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið, við seinni broytingum, vórðu háisolatiónsstovur settar í verkætlanina. Eftir drúgt fyrireikingararbeiði er komið fram til, at tað er skynsamari at gera isolatiónsstovur heldur enn háisolatiónsstovur. Krøvini til háisolatiónsstovur eru broytt munandi frá 2017 til í dag. Bygginevndin hevur mælt landsstýriskvinnuni til, at isolatiónsstovur verða gjørdar. Í mun til ta upphædd, ið er sett av til endamálið, vanta 6 mió. kr. í til at gera isolatiónsstovur.

Isolatiónsstovurnar fara at hava slúsu ímillum gongd og sjúklingastovu, soleiðis at trýstið lækkar frá gongd til slúsu og frá slúsu til sjúklingastovu. Eisini verður beinleiðis atgongd frá sjúklingastovu út í tún. Harumframt verður ventilatión við undirtrýsti í stovunum.

Rakstur av byggiplássi, broytingar og longd byggitíð
Rakstrarútreiðslurnar á byggiplássinum eru hægri til el, hita og annað, orsakað av longdari byggitíð, umframt broytingum o.a.

Tilsamans verður sostatt biðið um 43,7 mió. kr. til at halda áfram við verkætlanini við H-bygninginum.

Fyri at stígur ikki skal koma í verkætlanina og fyri, at arbeiðsplássið ikki skal verða lagt stilt, eru umraðfestingar gjørdar í verkætlanini. Hetta er gjørt fyri at fáa størri part av játtanini til bygningsarbeiðir og til longda byggitíð, fyri at tey mest átrokandi bygningsarbeiðini verða gjørd fyrst.

Tað eru serliga tekniskar skipanir, sum eru tiknar framum í raðfestingunum, tí hesar fevna fyri tað mesta um allan bygningin og taka drúgva tíð at gera. Eisini eru hesar týðandi fyri, at H-bygningurin kann verða tikin í nýtslu.

Øll játtanin til tól, útgerð og innbúgv, eins og til háisolatiónsstovur, var ikki brúkt ella bundin í avtalum við arbeiðstakara ella veitara, og er tað orsøkin til, at tað bar til at gera nakrar umraðfestingar. Arbeiðið hevur sostatt verið skipað á tann hátt, at steðgað er á við ávísum keypum, meðan tey arbeiðsøkir eru raðfest, har ið bygningurin skjótt kann verða tikin í nýtslu. Harumframt eru tey tól raðfest og bíløgd, har ið veitingartíðin er long, meðan onnur útgerð, tól og innbúgv eru útsett.

Innanfyri verandi verklagslóg ber til at halda arbeiðið í gongd til og við 31. oktober í ár.

H-bygningurin verður tikin stigvíst í nýtslu, so hvørt partar av honum verða lidnir, væntandi í hesi røð:

- Stórkøkur
- Endurvenjing við fysio- og ergoterapeutiskum viðgerðum
- Seingjavask við goymslutorni til sengur
- 10 seingjastovur

Við lógaruppskotinum verður biðið um at fáa materiella heimild til bygningsarbeiðir og byggiplássrakstur til at gera H-bygningin lidnan.

Neyðugt verður eisini at fáa økt játtanina til høvuðskontuna 11.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging (*Løgujáttan)* við 43,7 mió. kr., og verður hetta sett í uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri 2024.

1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið er gjørt fyri at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan.

1.2. Galdandi lóggáva

Niðanfyri eru nevndar tær verklagslógir, ið eru galdandi í sambandi við at útbyggja og umvæla Landssjúkrahúsið.

Løgtingslóg nr. 129 frá 22. desember 2008 um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið, við seinni broytingum.

Løgtingslóg nr. 64 frá 5. mai 2021 um at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman og um at keypa neyðgenerator, tól og útgerð.

Løgtingslóg nr. 82 frá 16. mai 2022 um at innrætta víðkaða partin av kjallaranum í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum til parkering, goymslu og reingerð, umframt til goymslutorn og vegleiðing í H-bygninginum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa materiella heimild at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan. Talan er um at fáa bygningin betur hóskandi til økta sjúkrahúsvirksemið.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur við sær, at arbeiðið at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum kann gerast liðugt, soleiðis at bygningurin kann verða tikin í nýtslu.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið er gjørt í samstarvi við Landssjúkrahúsið, Landsverk og Fíggjarmálaráðið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera avtalur um at byggja H-bygningin hjá Landssjúkrahúsinum lidnan at taka í nýtslu.

Útreiðslurnar av lógaruppskotinum eru 43,7 mió. kr.

Tað eru fleiri verklagslógir, ið fevna um verkætlanir knýttar at H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum. Við hesum lógaruppskoti verður biðið um at fáa materiella heimild at gera H-bygningin lidnan. Talan er um at fáa gjørt fleiri bygningsarbeiðir og longda byggitíð.

Við materiellari heimild til fleiri bygningsarbeiðir og útreiðslur til longda byggitíð, ber til at gera H-bygningin lidnan, so hann kann verða tikin í nýtslu.

Neyðugt verður eisini at fáa økt játtanina til høvuðskontuna Landssjúkrahúsið, útbygging, við 43,7 mió. kr. og verður hetta sett í uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri 2024.

Niðanfyri er fíggjarprofilur fyri allar verkætlanirnar, og í talvuni niðanfyri er talva við fíggjarprofili fyri hetta lógaruppskotið.

C verandi játtan
D nýggj játtan til Løgtingið at taka støðu til.

A	B		C	D																
Nr.	Evni		Verandi játtan	Nýggj játtan	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024
1	B-Bygningurin	(liðugt)	60,5																	
2	Røntgen	(liðugt)	24,4																	
3	Vaskarí	(liðugt)	21,6																	
4	Svimjihylur	(liðugt)	1,2																	
5	H-bygningurin*		659,0	43,7	3,1	1,1	0,8	3,9	4,4	6,6	20,0	16,7	70,8	88,7	111,3	128,2	134,2	31,1	38,2	43,7
6	Ymiskt viðlíkahald		51,3		0,0	3,2	1,6	0,9	3,5	5,3	2,6	4,6	5,2	5,8	4,0	3,0	4,8	2,0	5,0	
7	DAS		13,5													0,6	7,1	3,4	2,4	
8	Prosjekt. Avleiddar		42,8														3,6	23,6	15,7	
9	Way-finding		3,9															0,3	3,7	
10	VPK - (víðkaði parturin av		63,1															4,7	42,4	16,0
	Í alt		941,3	43,7	3,1	4,3	2,4	4,8	7,9	11,9	22,6	21,3	76,0	94,5	115,3	131,8	149,6	65,0	107,3	59,7
*Fíggjarprofilur til eykajáttanina til verkætlan; H-bygningurin																				43,7

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við sær fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi sáttmálar.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan, Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Eingin markaforðing er á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýriskvinnuna, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið gevur landsstýriskvinnuni materiella heimild til at gera avtalur fyri í alt 43,7 mió. kr. fyri at byggja H-bygningin lidnan. uppskotið leggur ikki heimildir til ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í lógargreinini verður heimilað landsstýriskvinnuni at gera avtalur um at gera H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan at taka í nýtslu fyri í mesta lagi 43,7 mió. kr.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Mælt er til, at verklagslógir galda 2 ár eftir mettu byggitíðina. Henda verkætlan er mett at verða liðug í 2024, og verður gildistíðin fyri verklagslógina tí ásett til 1. januar 2027.

Heilsumálaráðið, 07. september 2023

Margit Stóra
landsstýriskvinna

/ Turid Arge

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Kostnaðarmeting